## Claus um politikk

- Eg havi ikki beinleiðis áhuga fyri føroyskum politikki. Eg haldi ikki, at danskarar skulu blanda seg uppí føroyskan politikk. Eg fylgi tó við í altjóða poltikki. Mær dámar ikki væl Irak-kríggið



## Claus um føroyskan mat

- Mær dámar sera væl føroyskan mat. Ræst kjøt og súpan er favoritturin. Mær dámar tó ikki so væl knetti. Eg fekk einaferð eitt knetti við í so nógvum tolgi í, og síðani havi eg ikki etið knetti

# Sjómenn noyddu Cla

**- Eg sigldi við Venus, og føroyingarnir umborð vildu ikki tosa við meg, um eg tosaði danskt. Hetta var sjálvandi skemt frá teirra síðu, men tað noyddi meg so at royna at tosa føroyskt, og síðani havi eg roynt, sigur danin Claus Rasmussen, sum komandi kappingarár skal venja StÍF**



## Ítróttarprofilurin



**Heini S. Kristiansen**
heinik@sosialurin.fo

Claus Rasmussen verður venjari hjá StÍF komandi kappingarár. Hann hevur í tvey ár verið venjari hjá Neistanum, har ið hann fekk góð úrslit við ungum og óroyndum leikarum.

Claus og Neistin samdust tó um, at samstarvið ikki skuldi halda fram, og nú tekur hann við nýggjari avbjóðing á vestara armi av Skálafjørðinum.

Claus er úr Danmark. Hann er giftur við Guðruni Horn úr Havn, og tey eiga børnini Kára, Elsu og Teis. Tey búgva í Havn, har ið Claus eisini arbeiðir sum pedagog.

### Skaði steðgaði honum

Claus vaks upp í Suðurjútlandi. Hann spældi við lokala felagnum í ungdómsárunum, men hann gjørdist skaddur á ungum ári og misti meniskin.

Hann fekk tó vant seg upp aftur, men seinni sleitt hann krossbandið, og tað var endin á hansara hondbóltsleið sum virkin leikari.

- Tað var einans eitt sindur av hugnafótbólti, men tað endaði galið. Tá var grúsvøllur á Argjum, og eg sleitt krossbandið. Øll sum hava roynt tað vita, at tað er dráp, sigur Claus.

Hondbóltur fylti ein stóran part í lívinum hjá Claus. Tí var tað torført ikki at kunna spæla meira, men hann kastaði seg ístaðin yvir venjaragerningin.

- Tað var Guðrun sum fekk meg at taka venjaraskeiðið. Síðani havi eg vant nógv feløg, og mær dámar sera væl at vera venjari, sigur Claus, sum, umframt Neistan, hevur vant nøkur ungdóms- og divisiónslið í Danmark.

### Flutt ímillum

Claus hitti konuna Guðrun í Danmark. Hann kom fyrstu ferð til Føroya at arbeiða sum 23 ára gamal, eftir at hann hevði hitt Guðrun.

Claus og familjan hava eisini búð leingi í Føroyum

- Elsa varð fødd í Føroyum. Vit búðu nøkur ár í Føroyum tá, men so fór okkara elsti sonur, Kári, á eftirskúla, og tá fluttu vit øll til Danmarkar, har ið tann yngsti sonurin, Teis, varð føddur, sigur Claus.

Tey búðu so í Danmark, inntil Neistin bjóðaði teimum upp aftur. Teir vildu hava Claus at vera venjara hjá besta mansliðnum.

### Ungt lið

Fyrsta árið, har ið Claus var venjari, gekk ikki so væl hjá Neistanum. Teir endaðu niðastir við einans einum stigi. Neistin hevði mist nogv fólk og høvdu eitt sera ungt lið.

- Eg og nevndin í Neistanum vóru samd um, at vit skuldu arbeiða við at byggja eitt ungt lið upp. Hetta var leisturin, eg arbeiddi eftir. Tað var hart fyrsta árið einans at fáa eitt stig, men næsta árið gekk nógv betri, sigur Claus.

Seinna árið gjørdi Neistin seg leingi galdandi í oddinum, og fleiri ungir leikarar fingu sítt veruliga gjøgnumbrot. Hóast Claus hevði megnað meira við Neistaliðnum enn fleiri høvdu væntað, so steðgaði samstarvið við Neistan.

- Vit samdust um, at eg skuldi steðga. Nú er tíð til at fáa ein annan inn, sum kann menna leikararnar víðari. Eg haldi ikki, at ein venjari skal vera meira enn 2-3 ár í einum felag. Annars verða venjingarnar einstáttaðar, og venjarin hevur ikki meira at geva. Tveir ár í Neistanum var passaligt, sigur Claus.

### Løtt avgerð

Nevndin í StÍF hevði lagt merki til góða arbeiðið, sum Claus gjørdi í Neistanum, og teir bjóðaðu honum at vera venjari hjá besta mansliðnum. Claus ivaðist ikki í, at hann skuldi taka av.

- Tað var ein løtt avgerð. Eg mátti sjálvandi spyrja familjuna fyrst, tí at tey eru øll neistafólk, sigur Claus við einum smíli.

Claus sær nógvar møguleikar við StÍF.

- StÍF hevur góða manning, og teir spæla søguliga góðan